Styrkispælið

– brúka styrkirnar í flokkinum



Lousie Tidmand og Ivan Jakobsen hava ment spælið

Endamálið við styrkispælinum er at fortelja tær góðu søgurnar og lurta eftir teimum góðu søgunum, so vit fáa eyga á styrkirnar hvør hjá øðrum. Gransking vísir, at okkara trivnaður, motivatión og sjálvsvirðing mennist, tá ið vit arbeiða við styrkjunum.

Spælið leggur dent á tað góða – okkara styrkir og okkara góðu søgur. Spælið kann vísa okkum á okkara styrkir og kann hjálpa okkum at siga tær góðu søgurnar um okkum. Tað er alt ov sjáldan, at vit hava góðar stundir at fortelja tær góðu søgurnar, uttan at vit verða órógvað. Tá ið tit spæla styrkispælið, hava tit møguleikan, men spælið hevur eisini eitt annað endamál.

Tað endamálið er, at vit kunnu fáa eyga á styrkirnar hvør hjá øðrum við søgum úr gerandisdegnum. Vit læra okkum sjálv at kenna við søgunum, vit siga um okkum sjálv, og vit læra, hvar og hvussu vit brúka okkara styrkir. Tá ið vit vita tað, kunnu vit læra at brúka styrkirnar meira í gerandisdegnum. Tá ið vit brúka styrkirnar, verða vit glað og hugagóð, og vit fáa betri sjálvsvirðing, við øðrum orðum hava vit tað gott – vit trívast.

Tá ið tit spæla spælið, fara tit við søgunum at læra um styrkirnar hvør hjá øðrum, og tit fara at finna fram til nógvar ymiskar styrkir, sum eru virknar í tykkum øllum somlum.

Tær søgur, sum tit siga, kunnu vera um/úr tykkara frítíð, skúlatíð/arbeiðstíð ella bæði. Tit velja.

Styrkispælið

Spælivegleiðing 11 ár og eldri



Í spælinum eru:

- 4 sett av styrkikortum við teimum 24 styrkjunum
- 40 blá frásøgukort skúli/arbeiði
- 60 gul frásøgukort frítíð
- 4 sett av forvitniskortum
- 1 blokkur við avkrossingartalvum. Minnist til at goyma tykkara egnu talvu, tí tit kunnu brúka hana næstu ferð, tit spæla styrkispælið.
- 1 tímaglas



Uppsetingin hjá frásøgufólkinum



Uppsetingin hjá áhoyrarunum

Luttakararnir býta forvitniskortini ímillum sín, lesa tey og leggja tey í ein stakk framman fyri seg.

Fyrsti luttakarin tekur eitt frásøgukort upp, og spælið er byrjað.

Tá ið ein luttakarin tekur eitt frásøgukort upp, fortelur hann fyrstu søguna, sum kemur fram í huganum um tað, sum stendur á frásøgukortinum. Megnar hann ikki at byrja eina søgu um tað evnið, tekur hann eitt nýtt kort upp.

Tá ið frásøgufólkið er til reiðar at fortelja søguna, vendir luttakarin høgrumegin frásøgufólkið tímaglasinum við. Søgan skal vera søgd so neyvt, sum til ber. Steðgar frásøgufólkið upp, kunnu áhoyrararnir brúka forvitniskortini.




Frásøgukort, frítíð



Frásøgukort, skúli/arbeiði

Ætla tit at leggja dent á styrkirnar, sum tit brúka í frítíðini, taka tit frásøgukortið frítíð. Ætla tit at leggja dent á styrkirnar, sum tit brúka í skúlanum ella til arbeiðis, taka tit frásøgukortið skúli/arbeiði. Tit kunnu eisini blanda kortini.


Fortsplekort
Mind
Fortsplekort
Skole
11-17 år

Um spælið:

2 – 4 luttakarar

Tíð: umleið 25 minuttir pr. umfar. Best er at spæla 2 ella fleiri umfør. Hvør søga kann í mesta lagi vera 3 minuttir til longdar.

Uppseting:

Setið tykkum við eitt borð.

Leggið bláu og gulu frásøgukortini inn á miðjuna á borðinum.

Allir luttakararnir leggja sítt sett av styrkikortum framman fyri seg, so at øll kortini liggja við mynda- ella tekstsíðuni upp (sí myndina).

Luttakararnir fáa hvør sítt sett av forvitniskortum.

Hvørt sett hevur sítt hevur egna merki: 

Allir luttakararnir fáa hvør sína avkrossingartalvu við teimum 24 styrkjunum. Talvan er eisini aftast *Bókin um mínar styrkir.*

Øll skulu hava ein blýant í part.

Setið tímaglasið hjá frásøgukortunum.

Til frásøgufólkið:

- Sig, hvat stendur á frásøgukortinum.
- Byrja við byrjanini – ikki byrja við at siga kjarnuna í søguni. Hvør var við, hvat hendi, hvar vart tú, og hvat gjørdi tú?
- Brúka myndamál og brúka sansirnar. Greið frá umhvørvinum, ljóðum og luktum, og greið frá smakkum og kenslum.

Til áhoyrararnar:

- Hyggið at styrkikortunum, ímeðan tit lurta.
- Hvørjar styrkir eru virknar í frásøgnini?
- So hvørt tit hoyra, at ein styrki er virkin í søguni, taka tit styrkikortið við tí styrkini upp og goyma tað í hondini.

Styrkin kann vera virkin soleiðis:

- Tað, sum frásøgufólkið gjørdi ella segði um seg sjálvt ella onnur, tá ið hann/hon greiddi frá.
- Hvussu søgan verður søgd.

Tá ið frásøgufólkið hevur fortalt sína søgu, skulu áhoyrararnir skiftast um at siga, hvørjar styrkir teir hava í hondini og greiða frá, hvussu teir hoyrdu, styrkirnar vóru virknar.

Hvørja ferð frásøgufólkið fær eina styrki, setur hann/hon X í talvuna ella í talvuna í *Bókin um mínar styrkir*. Fær frásøgufólkið t.d. forvitni frá øllum trimum áhoyrarunum, setur hann/hon trý X í talvuna við forvitni.

Tá ið tit hava spælt nøkur umfør, fara tit at síggja eitt mynstur í styrkjunum, sum tit fáa frá áhoyrarunum. Nú kunnu tit hyggja at talvuni og meta, um tit síggja somu styrkir í tykkum sjálvum.

Er søgan um ein annan persón enn frásøgufólkið, skulu áhoyrararnir taka allar styrkirnar við – bæði tær, sum tit síggja í persóninum, sum søgan er um og tær, sum tit síggja í frásøgufólkinum.

Spælið í minsta lagi tvey umfør, soleiðis at øll sleppa at siga minst tvær søgur.

Styrkispælið

Spælivegleiðing 11 ár og eldri

Dømi um eina søgu

Frásøgukort: Ein góð uppliving

Dóttir mín og eg vóru farin ein gongutúr. Eg hevði eina góða kenslu innan í mær, tí eg leiddi hana, og vit tosaðu saman um stórt og smátt (umsorgan). Veðrið var so sera gott, har vit gingu; hagin var heystlittur og luftin var klár og blá (ansur fyri tí vakra).

Men vit hugsaði slættis ikki um, hvussu leingi vit høvdu gingið. Nú fór at skýma, og vit samdust um at fara heim við bussinum (fyrilit).

Men tíverri hevði hvørgin okkara pengar við. Dóttirin helt, at vit skuldu savna fløskur, soleiðis at vit kundu gjalda ferðaseðilin (kreativitetur). Hetta vísti seg at vera stak hugnaligt, og vit kappaðust um at finna næstu fløskuna (áhaldni, samstarv). Áðrenn vit vistu av, høvdu vit savnað nóg mikið av fløskum at lata inn, soleiðis at vit kundu keypa bussferðaseðlarnar.

Í hesari frásøgnini eru ivaleyst fleiri styrkir, men nú hevur tú lisið eitt dømi um, hvussu okkara styrkir eru virknar í einari vanligari frásøgn frá einum vanligum degi – bæði í søguni, men eisini, hvussu vit siga søguna. Sigur tú skemtiliga frá ella við speisemi, er tað tekin um, at tú brúkar styrkina skemt, tá ið tú sigur frá.